



*Eg setti treytir við, tá eg lat listasavninum Bládýpið, tí eg var bangin fyri at leiðslan har annars fór at gera, sum hon vildi, við listaverkið*

# savninum

nevniliga upprunaliga við í arbeiðinum at fáa gjørt Bládýpið til serframsýningina Container 96 og hevði verkið í varðveitslu eina tíð.

### Tekningar klárar

Saman við skrivinum liggja fleiri tekningar, sum arkitekturin J.P. Gregoriussen, ið eisini hevur teknað Føroya Listasavn, hevur gjørt. Tekningarnar eru eitt neyvt uppskot til, hvussu Bládýpið kann byggjast saman við Listasavninum.

- Vit vóru á fleiri fundum við stýrið, har limirnir vóru stak positivir mótvegis uppskotinum. Tað var í øllum førum ongantíð upp á tal at flyta verkið nakra aðrastaðni, sigur J.P. Gregoriussen við Sosialin.

Hann leggur afturat, at eftir at Árni Winther, stýrislimur og arkitektur, hevði hugt nærri at tekningunum, var aftur farið á fund.

Bæði Tróndur Patursson og J. P. Gregoriussen vísa á, at Árni Winther var positivur mótvegis uppskotinum og lovaði at arbeiða víðari við tí út frá tekningunum.

Árni Winther er framvegis limur í stýrinum fyri Listasavnið. Hóast vit hava roynt fleiri ferðir, er tað tó ikki eydnast at fáa eina viðmerking frá Árna Winther í hesum málinum.

Tróndur Patursson vísir á, at hansara uppskot ikki skuldi skiljast sum eitt ultimatum, men sum eitt boð upp á eina gjøgnumhugsaða loysn

- Eg eri opin fyri broytingum í uppskotinum, men treytin er framvegis, at Bládýpið verður knýtt at Listasavninum á ein hátt, sum tekur røttu listarligu og arkitektoniskum fyrilitini, og at verkið verður opið fyri almenninginum, sigur Tróndur Patursson.

# Ivi um listarliga ráðgeving



*Bládýpið stendur framvegis heldur forfjónað á parkeringsøkinum hjá Listasavninum*

**Stórur ivi valdar um, á hvørjum listafakligum grundarlag leiðslan á Listasavninum viðger málið um Bládýpið**

LISTASAVNIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@soslaiurin.fo*

Tað tykist rættiliga ógreitt, hvørja listafakliga ráðgeving Føroya Listasavn ætlar at brúka í málinum um Bládýpið higartil.

Listfrøðingurin hjá Listasavninum seinastu tvey árini, Ingeborg Bugge, vil ikki úttala seg í málinum, bæði tí hon sigur seg ikki kenna listaverkið Bládýpið, og tí hon ikki vil verða drigin inn í «hatta díkið av intrigum kring Listasavnið«, sum hon málber seg .

Eisini fór hon úr starvinum á Listasavninum í desember í fjør, sigur hon. Tað bar heldur ikki til at fáa eina viðmerking frá listarliga ráðgevanum hjá Listasavninum Dagmar Warming.

Og heldur ikki stýrisformaðurin vil koma nærri inn á spurningin um listarligu ráðgevingina í málinum

### Altjóða reglur plikta

Men, tað kann hann hinvegin blíva noyddur til, staðfestir listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen, og vísir á, at leiðarin á Listasavninum jú alment hevur boðað frá, at savnið neyvt fylgir reglunum hjá ICOM, Altjóða stovninum fyri listasøvn. Og at tað forpliktar.

- Fyri Bládýpið merkir tað, at leiðslan má finna út av, hvussu verkið best kemur til sín rætt innan økið hjá Listasavninum, tí tey hava tikið ímóti gávuni uttan mun til um tað er hent skrivliga ella munnliga. Eg síggi tó ikki keiøkið sum part av økinum hjá Listasavninum, sigur Inger Smærup Sørensen.

Hon leggur afturat, at sambært reglunum hjá ICOM so »skal leiðslan á einum listasavni neyvt umhugsa fakliga grundarlagið og tryggja sær at øll áhugamál verða hoyrd« í slíkum spurningum.

- So tað skuldi undra meg, um Listasavnið ikki tekur onkur av teimum mongu fakligu tilmælunum um Bládýpið til eftirtektar, sigur Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur.